HEILSUFRØÐILIGA STARVSSTOVAN

# Ferðing við hundi

**Vegleiðing til ferðing við hundi úr Føroyum til:**
**Danmarkar (undantikið Grønland), Finnlands, Írlands, Íslands,**
**Norra (undantikið Svalbard), Stóra Bretlands og Svøríkis, og heimaftur**

## Ferðaloyvi

Um tú skal ferðast við hundi úr Føroyum til omanfyrinevndu lond og heimaftur, skal tú hava eitt ferðaloyvi frá Heilsufrøðiligu starvsstovuni til hundin.
Fyri at fáa ferðaloyvi skal tú:

1. Senda umsókn um ferðaloyvi inn til Heilsufrøðiligu starvsstovuna (**minst 6 yrkadagar** áðrenn fráferð úr Føroyum)
2. Gjalda fyri málsviðgerðina
3. Senda heilsuváttan til Heilsufrøðiligu starvsstovuna (**2 yrkadagar** áðrenn fráferð úr ferðalandinum)

## 1. Umsókn um ferðaloyvi

Umsóknarblað til umsókn um ferðaloyvi er á heimasíðuni hjá Heilsufrøðiligu starvsstovuni www.hfs.fo.
Søkjast kann um ferðaloyvi beint eftir at hundurin er eyðmerktur og koppsettur. Tó er seinasta freist at senda umsóknina inn **6 yrkadagar**, áðrenn ætlaða ferðin úr Føroyum byrjar.

**Fastur bústaður í Føroyum**
Fólk, sum hava fastan bústað í Føroyum, kunnu fara í annað land at ferðast við sínum hundum.

Eigarar, sum **ikki hava fastan bústað** í Føroyum, hava **ikki loyvi** at hava hund við til Føroya at ferðast.

**Fylgjari**
Um eigarin ikki sjálv/ur er við á ferðini, skal fylgjari ásetast. Fylgjarin hevur ábyrgdina av hundinum, inntil hundurin er handaður eigaranum.

**Eyðmerking**
Hundurin skal verða eyðmerktur við einum mikrosendara (da: chip) undir húðina.
Eyðmerkingarnummarið hjá hundinum skal standa á øllum kravdum skjølum.

**Koppsetingar**
Hundurin skal verða koppsettur í seinasta lagi **4 vikur**, áðrenn hann fer úr Føroyum.
Koppsetingarnar skulu ikki vera eldri enn framleiðarin mælir til, tá ið hundurin kemur heimaftur til Føroya.
Hundurin skal koppsetast fyri hesar sjúkur:

- Hundaøði, Rabies
- Hundasjúku, Canine distemper
- Livrasótt, Infectious canine hepatitis
- Canine parvovirus
- Canine parainfluenzavirus
- Leptospirosu, leptospirosis

Verða endurkoppsetingar gjørdar til tíðina, kann hundurin fara at ferðast beint eftir endurkoppsetingina.

**Hundahvølpar** skulu verða í minsta lagi **12 vikur gamlir**, tá ið teir verða koppsettir, og síðani skulu ganga **4 vikur**, áðrenn teir kunnu fara úr Føroyum.

## 2. Gjald

Gjald verður kravt fyri ferðaloyvi og eftirlit.
**Minstagjald er 750 kr.**, sum skal gjaldast á kontu í BankNordik: **6460-000.992.765.6,**

áðrenn málsviðgerðin byrjar. **Kvittan** fyri gjald skal sendast til Heilsufrøðiligu starvsstovuna saman við umsóknarblaðnum.
Um viðgerðartíðin verður longri enn 1,5 tíma, verður samsvarandi rokning send.

## 3. Heilsuváttan

Heilsuváttanin er váttan frá djóralækna um, at hundurin er frískur og hevur fingið allar kravdu sníkaviðgerðirnar.
Váttanin frá djóralæknanum skal ikki vera eldri enn **2 dagar** tá ferðin til Føroya byrjar.

**Viðgerðir**
Hundurin skal viðgerast fyri hesar innan- og uttansníkar:

- Rundorm
- Franskan hjartaorm
- Bendilorm, eisini eccinococcar (*Echinococcus granulosus* og *E. multilocularis*)
- Skrubb
- Lýs
- Loppur
- Skógarmottur

Viðgerðirnar skulu ikki verða eldri enn framleiðarin mælir til, tá ið hundurin kemur til Føroya. Djóralæknin kann vegleiða um hetta.

**Ferðadagar**
Av tí at heilsuváttanin skal sendast inn **2 yrkadagar** áðrenn fráferð úr ferðalandinum, og at hon tá ikki skal vera eldri enn **2 dagar**, kunnu fráferðir úr ferðalandinum bert vera hesar dagar:

- Mikudag
- Hósdag
- Fríggjadag
- Leygardag

Hetta skal eisini havast í huga í sambandi við høgtíðir og heiligdagar. 2 fylgjandi yrkadagar skulu altíð vera, fyri fráferð úr sendaralandinum. Sí kunning um hetta á heimasíðuni.

**Ferðaloyvi**
Ferðaloyvi skal fylgja við hundinum, tá ið hann kemur heimaftur til Føroya.
Ferðaloyvið verður fylt út, skrivað undir av einum embætisdjóralækna á Heilsufrøðiligu starvsstovuni, og sent umsøkjaranum.
**GG:** Ferðaloyvi skal váttast av flutningsfelagnum, áðrenn hundurin sleppur umborð á flutningsfarið í útlandinum. Um einki ferðaloyvi er við hundinum, noktar flutningsfelagið hundinum at sleppa umborð.

**Flutningur**
Djóraeigarin skal tryggja sær, at flutningurin fer fram í samsvari við ásetingarnar í djóravælferðarlógini, íroknað at flutningsbúr, flutningskassar o.tíl. lúka krøvini um luft, stødd, fóður, vatn o.a.

## Eftirlit

Tá ið hundurin kemur heimaftur til Føroya, skal eigarin ella fylgjarin sjálvboðin vísa tollmyndugleikanum ferðaloyvið.
Tollmyndugleikin váttar ferðaloyvið og sendir eitt avrit til Heilsufrøðiligu starvsstovuna.
Heilsufrøðiliga starvsstovan ger skjalaeftirlit av øllum hundum, sum hava verið og ferðast.
Heilsufrøðiliga starvsstovan kann eisini gera samleika- og/ella fysiskt eftirlit við hundunum.

## Avleiðingar, tá ið treytirnar ikki eru fylgdar

Heilsufrøðiliga starvsstovan hevur eftirlit við hundum, sum hava verið og ferðast, og hevur myndugleika at nokta innflutningi, um illgruni er um smittandi sjúku, vantandi ferðaloyvi v.m.
Í hesum førum avgerð Heilsufrøðiliga starvsstovan um hundurin skal:

- Kannast, koppsetast ella viðgerast eftir leiðbeining frá Heilsufrøðiligu starvsstovuni.

- Setast í sóttarhald undir eftirliti av Heilsufrøðiligu starvsstovuni og, um neyðugt, kannast, koppsetast og viðgerast fyri sníkar, til treytirnar eru loknar.
- Sendast aftur til ferðalandið, um so er, at veterineri myndugleikin í ferðalandinum gevur loyvi til tess.
- Verða avlívaður.

Um tað er heilsufrøðiliga ráðiligt, verður fyrilit tikið til, hvønn av møguleikunum eigarin ynskir.

**Aðrar útreiðslur**
Eigarin rindar allar útreiðslur í sambandi við ferðing við hundinum. Útreiðslur, ið m.a. standast av at hundurin skal sendast aftur til ferðalandið, ella um hann skal avlívast, skulu eisini rindast av eigaranum.

**Lógarheimildir**
Løgtingdlóg nr. 49 frá 30. apríl 2018 um djóravælferð (djóravælferarlógin), sum broytt við løgtingslóg nr. 91 frá 7. juni 2020.

Kunngerð nr. 82 frá 18. mai 2021 um at innflyta hundar, kettur og gitnaðarevni.

Kunngerð nr. 6 frá 26. januar 2009 um gjøld fyri veterinerar og heilsufrøðiligar kanningar og eftirlit, sum seinast broytt við kunngerð nr. 74 frá 22. mai 2014.